# Úr grannalondum

*Lagt til rættis: Árni Joensen*

## Um sundið at arbeiða

Í Danmark hava sjúkrarøktarfrøðingar ilt við at fáa arbeiði eftir lokna útbúgving. Av teimum, sum vóru liðug við útbúgvingina í januar, fóru 60 prosent beinleiðis út í arbeiðsloysi, sigur DR.

Men nú fáa teir arbeiðsleysu sjúkrarøktarfrøðingarnir møguleikar at brúka útbúgvingina í Svøríki. Eitt nú eru millum 40 og 50 størv sum sjúkrarøktarfrøðingur á Skåne Universitetssygehus leys at søkja.

Tað hevur annars ikki verið vanligt, at svensk sjúkrahús hava spurt eftir danskari arbeiðsmegi, og fyri bara fáum árum síðani var gongdin tann øvugta. Eitt nú søktu fleiri svenskir sjúkrarøktarfrøðingar starv í Danmark so seint sum í 2009 og fingu arbeiði, sigur danska kringvarpið.

## Fer ikki frá enn



Haraldur kongur í Noregi avdúkaði á einum tíðindafundi í Slovenia í vikuni, at hann hevur ongar ætlanir um at siga trúnuna frá sær enn. Kongur viðgekk, at hann hevur ofta fingið spurningin, men segði, at hann kennir seg væl, og at hann tí ikki hevur nakra orsøk til at fara frá.

Hann avdúkaði kortini, at hann hugsar ikki bara um seg sjálvan í hesum høpi, og at hann fer at lurta eftir góðum ráðum:

- Eg havi avtalað við míni børn, at tey skulu varskógva meg tann dagin, tey halda, at nú er tíð at leggja frá mær, segði Haraldur kongur brosandi.

## Inuittarnir fjølgast

Ein nýggj teljing í Kanada vísir, at nú eru inuittarnir har næstan 50.000 í tali, og tað merkir, at nú eru umleið 170.000 inuittar í teimum arktisku økjunum.

Nógv teir flestu inuittarnir búgva í Kanada, Grønlandi og í Alaska. Í Tjukotka har norðuri í Russlandi eru bara umleið 1.200 inuittar eftir, sigur altjóða inuittafelagsskapurin ICC.



# Tilfeingisgjaldið í Íslandi hækkar

**Eftir drúgvar tingingar samdist íslendska stjórnin í gjár um eitt uppskot um nýggjar reglur á fiskiveiðiøkinum. Ein avleiðing verður hægri tilfeingisgjald**

Innihaldið í uppskotinum hjá stjórnini er ikki almannakunngjørt, men fjølmiðlarnir hava kortini borið ymisk tíðindi um tað. Eitt nú er komið fram, at reiðarí fáa fiskirættindi fyri 15 ár, og at tey kunnu søkja um at endurnýggja sáttmálan, tá sáttmálaskeiðið er hálvrunnið.

Eisini er komið fram, at veiði- ella tilfeingisgjaldið hækkar munandi. Onkur fjølmiðil sigur, at gjaldið hækkar eina knappa helvt, og at reiðaríini skulu gjalda einar fimm milliardir íslendskar krónur fyri nýtslurættin.

Jóhanna Sigurðardóttir, forsætisráðharri, ásannaði aftan á stjórnarfundin í gjár, at málið um fiskiveiðipolitikkin er stórt og trupult, og at tað eru nógvar áskoðanir um, hvat rætt er at gera. Hon kendi seg tó sannførda um, at stjórnin er komin til eitt gott úrslit.

Uppskotið fer nú til stjórnarflokkarnar til ummælis, og síðani verður tað lagt fyri vinnuna. At enda verður tað so lagt fyri Altingið, og ikki fyrr enn tá verður innihaldið kunngjørt fyri almenninginum.

# Autistar vilja sleppa í studentaskúla

**Paderup Gymnasium í Randers er einasti studentaskúli í Jyllandi, sum hevur ein serligan flokk fyri autistar, og áhugin fyri at sleppa í flokkin er veksandi. Í flokkinum er pláss fyri 10 næmingum, men í ár hevur skúlin fingið 20 umsóknir.**

At tað bara eru 10 næmingar í flokkinum kemst av, at autistar hava størri sosialar trupulleikar enn onnur, um ov nógvir næmingar eru í flokkinum, sigur rektarin, Jan Becher Sørensen, við danska kringvarpið. Hann sigur, at skúlin hugsar seg væl um, tá nýggir næmingar verða tiknir inn.

– Vit tosa við ein sálarfrøðing og ein námsfrøðiligan ráðgeva, sum hava kunnleika til autistar. Við øðrum orðum leggja vit dent á tað fakliga støðið og diagnosurnar, áðrenn vit taka næmingin inn, sigur rektarin.



*10 næmingar eru í flokkinum, tí fleiri næmingar høvdu givið sosialar trupulleikar*

*Mynd: Paderup Gymnasium*

Hetta er fjórða árið, at skúlin í Randers tekur næmingar til flokkin, sum er ein roynd, ið kenslumálaráðið í Keypmannahavn fíggjar. Teir fyrstu studentarnir úr autistaflokkinum fáa húgvuna í summar.